LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavnar kommuna
Vaglið
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 5. november 2021
J.Nr.: LUM-16- 21/19683-23
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Skriv frá setiumboðsmanni**

**Viðvíkjandi málsviðgerðini hjá Tórshavnar kommunu av einari umbøn um innlit**

Tann 10. august 2021 fekk eg eina klagu um málsviðgerðina hjá Tórshavnar kommunu av tveimum umbønum um innlit, ið høvdu samband við konsertina við Elton John á Tórsvølli í juni 2010.

Klagan snúði seg í høvuðsheitum um, at Tórshavnar kommuna ikki hevði givið nøktandi málsviðgerð av hansara innlitsumbønum. Millum annað ynskti klagarin at fáa innlit í upplýsingar, ið vístu um ein rokning frá fyriskiparunum av konsertini til Tórshavnar kommunu var goldin. Eisini ynskti klagarin at vita, hvat hendi við einari umsókn um stuðul frá fyriskiparanum til Tórshavnar kommunu.

Tann 31. august 2021 gav Tórshavnar kommuna umboðsmanninum eina frágreiðing til klaguna og avrit av samskiftinum, ið klagarin hevði havt við Tórshavnar kommunu um málið.

Í stuttum greiddi Tórshavnar kommuna frá um málsgongdina og vísti samstundis aftur, at málsviðgerðin av innlitsumbønunum ikki hevði verið nøktandi. Samanumtikið vísti Tórshavnar kommuna í frágreiðingini á, at klagarin, tann 21. juli 2021 og tann 12. august 2021, hevði fingið innlit sum umbiðið og svar uppá sínar fyrispurningar um málið.

Soleiðis sum málið er lýst, setti klagarin fram eina umbøn um innlit tann 8. juli 2021, ið Tórshavnar kommuna svaraði tann 21. juli 2021.

Tann 21. juli 2021 setti klagarin fram enn eina umbøn um innlit, ið var grundað á fyrru umbønina, dagfest 8. juli 2021. Hendan umbønin varð ikki endaliga svarað fyrr enn tann 12. august 2021, eftir at klagarin hevði sent Tórshavnar kommunu fleiri áminningar.

Í § 16, stk. 1 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina) er ásett, at ein umbøn um innlit skal svarast skjótast gjørligt. Hetta merkir, at myndugleikin beinanvegin skal snarkanna eina umsókn um innlit til tess at finna útav, um umbønin kann avgreiðast alt fyri eitt, ella um øll ella partar av umbønini krevja eina longri málsviðgerðartíð.

Í § 16, stk. 2 í innlitslógini er ásett, at um myndugleikin ikki hevur gingið umbønini á møti ella noktað henni innan 10 dagar frá tí, at umbønin var sett fram, skal myndugleikin boðað viðkomandi frá orsøkini til hetta, og nær ein avgerð kann væntast. Hetta merkir, at myndugleikin, tá hann hevur snarkannað umbønina, hevur eina skyldu at boða viðkomandi frá, um orsøkina til at málsviðgerðin verður drúgv.

Vísandi til omanfyri, haldi eg tað ikki vera nøktandi, at Tórshavnar kommuna nýtti ávikavist 13 dagar at svara fyrru umbønini um innlit og 22 dagar at svara seinnu umbønini um innlit.

Í svarinum til klagaran, dagfest 12. august 2021, segði Tórshavnar kommuna, at orsøkin til drúgvu málsviðgerðartíðina var feria.
Tað er galdandi, at ein myndugleiki sum Tórshavnar kommuna, ið ikki stongir fyri allari avgreiðslu um summarið, eigur at skipa síni viðurskifti soleiðis, at kommunan altíð er før fyri at viðgera og avgreiða umbønir um innlit sum vanligt.

Á síðu 13 í FOB 2021-1 skrivar danski umboðsmaðurin soleiðis um evnið, ið er sambæriligt við tað, ið er galdandi fyri føroysku innlitslógina:

> "Det er den enkelte myndigheds ansvar at sikre et beredskab i en eventuel lukningsperiode, som gør det muligt at behandle aktindsigtssager inden for de frister, der er opstillet i loven og forarbejderne, jf. FOB 2016- 45, herunder om nødvendigt at foretage en prioritering af behandlingen af de enkelte sager ud fra deres karakter. Hvor et midlertidigt fravær hos en konkret (nøgle-)medarbejder, der skyldes sygdom, kursusophold el.lign., efter omstændighederne vil kunne begrunde en kortvarig forlængelse af sagsbehandlingstiden, gør det samme sig ikke gældende for sommerferielukning, der skyldes et ønske om at nedbringe merarbejdspukler mv. En myndighed mv. må i den forbindelse udøve sin ledelsesret på en sådan måde, at det sikres, at hverken personaleretlige eller offentlighedslovens regler tilsidesættes."

Soleiðis sum málið er lýst, havi eg ikki grundarlag fyri at halda, at klagarin ikki hevur fingið svar uppá teir fyrispurningar, ið settir vóru av honum, og fingið skjøl, ið vóru viðkomandi og samsvaraðu við umbønir hansara um innlit.

Tó undraðist eg á, hví Tórshavnar kommuna ikki hevði latið innlit í upplýsingar, ið vístu at umrødda rokning var goldin. Sambært upplýsingum í málinum, hevði Tórshavnar kommuna boðað klagaranum frá, at kommunan hevði kannað um nevnda rokning var goldin og hevði eisini fingið váttan fyri hesum.

Til fyrispurning frá mær um hetta, fekk eg tann 21. oktober 2021 upplýsingar frá Tórshavnar kommunu, ið vístu fakturagongdina frá innlesan, váttan, ávísing og bókføring/útgjald hesi rokning viðvíkjandi.

Tann 25. oktober 2021 boðaði Tórshavnar kommuna mær frá, at klagarin sama dag hevði fingið innlit í upplýsingarnar, ið vístu at umrødda rokningin var goldin. Tá vóru stívliga 3 mánaðir gingnir síðan klagarin, tann 21. juli 2021, bað um innlit í hetta.

Samanumtikið fari eg at geva Tórshavnar kommunu eina átalu fyri handfaringina av hesum máli.

Avrit av hesum skrivi er sent klagaranum til kunningar og verður í næstum almannakunngjørt á heimasíðu okkara - www.lum.fo - í navnleysum líki.

Vinarliga

Jan Sjóstein
setiumboðsmaður